*Lagt til rættis: Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo*

# Skal ikki enda í hurlivasa

**ANTIN ELLA** Skulu vit ganga Fólkaflokkinum á møti, kann tað enda við 15 ella 20 kommunum og so er alt farið í vaskið, sigur Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum

- Skulu kommunurnar leggjast saman og fáa fleiri málsøki at umsita, skal tað gerast ordiligt, ella skal tað slett ikki gerast.

Tað staðfestir Hans Pauli Strøm, sum umboðar Javnaðarflokkin í politiska bólkinum, sum roynir at finna semju í samgonguni um ein nýggjan kommunubygnað.

Men hóast summi siga tað øvugta, er greitt, at enn er samgongan rættiliga langt frá eini semju um hetta.

Hans Pauli Strøm sigur, at Javnaðarflokkurin hevur sett sum treyt fyri at leggja eldraøkið undir kommunurnar, at talan verður nakrar stórar, sterkar eindir.

- Har er onki at raffla um. Skal eldraøkið undir kommunurnar, skulu tær verða so mikið stórar og sterkar, at tær verða førar fyri at taka ímóti, annars verður eldraøkið verandi undir landinum.

Somuleiðis skal ein eldralóg gerast áðrenn, so at kommunurnar vita akkurát, hvørji krøvini verða.

### Blokkstuðul

Ein onnur treyt er, at vit fáa eina útjavningarskipan, so at trygd fæst fyri, at kommunurnar verða førar fyri at átaka sær uppgávuna, hóast tað er ymiskt, hvussu tær eru fyri fíggjarliga.

Tað skal verða okkurt slag av blokkstuðuli, tí í landsskatti rinda tey við góðari inntøku meir, men í kommunuskatti rinda øll sama prosentpart.

So verður tað kommunuskatturin, sum skal fíggja eldraøkið, má tað hækkast og tað fer at raka tær lágu inntøkurnar meint.

- Øll hesi viðurskifti skulu verða púra greið áðrenn tað kemur upp á tal at leggja eldraøkið undir kommunurnar, so at vit hava fulla trygd fyri, at tað ikki endar í hurlivasa, men er í fullkomiliga tryggum hondum.

Men av tí, at Javnaðarflokkurin krevur, at kommunurnar skulu verða stórar og sterkar, vil flokkurin ikki vita av uppskotinum hjá Fólkaflokkinum um fólkaatkvøðu, soleiðis sum Jógvan á Lakjuni greiðir frá í aðrari grein.

- Skal eldraøkið leggjast undir kommunurnar, skal talan vera sjey ella níggju kommunur í mesa lagi. Men verður kravið um fólkaatkvøðu eftir fólkafloksleisti eftirlíkað, kann tað skjótt enda við 15-20 kommunum og so kemur ikki upp á tal at leggja eldraøkið undir kommunurnar, sigur Hans Pauli Strøm.




**ÓVISSA**

*Enn veit ongin, hvussu Føroyakortið fer at síggja út tann 1. januar í 2013. Uppleggið er, at tað skulu verða níggju kommunur, men fær Fólkaflokkurin sín vilja, kann tað enda við 15 ella 20 kommunum – og so er alt farið í vaskið, sigur Javnaðarflokkurin*

# Hava ongantíð verið so nær

**BÍÐISTØÐA** Annika Olsen hevur góðar vónir, men nú bíðar hon eftir afturmeldingum

Ein semja um at nýskipa kommunala bygnaðin og leggja kommunur saman, hevur ongantíð verið so nær sum nú.

Tað sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Annika Olsen sigur, at nýskipanarætlanin skal nú til politiska viðgerð í samgonguflokkunum.

Hon leggur eisini dent á, at endamálið hjá samgonguni er, at nýskipanin á kommunala økinum skal eisini hava so stóra fólksliga undirtøku, sum til ber.

Tí er ætlanin nú send teimum báðum kommunufeløgunum til hoyringar, eins og tey eisini hava verið við á fundum um ætlanina.

Nú bíðar hon so eftir eini afturmelding haðani.

### Fólkslig tilgongd

Annars ætlar hon eisini at ferðast til allar kommunurnar at greiða frá ætlanini. Tað er eisini ein møguleiki, at hon fer at heita á allar kommunur um at skipa fyri borgarafundum, har landspolitikarar kunnu vera við at kunna og svara spurningum.

Tað er somuleiðis ein møguleiki, at fólkaatkvøða skal vera í kommunum kring landið um nýskipanina.

Annika Olsen miðjar eftir, at málið kann verða lagt fyri Løgtingið og avgreitt, áðrenn Løgtingið fer í summarfrí, helst í síðst í apríl ella fyrst í mai.

Treytin fyri tí er sjálvandi, at samgonguflokkarnir taka undir við tí, men tað hevur hon góðar vónir um, tí politiski fylgibólkurin, sum hevur stungið út í kortið, er vælmannaður við tað, at har sita bæði løgmaður, landsstýriskvinnan í innlendismálum, teir tríggir floksformenninir í samgonguni, umframt tvey umboð fyri hvønn flokk í samgonguni.

Annika Olsen hevur sagt áður, at fæst ikki ein semja um kommunubygnaðin nú, sleppur hon ætlanini, tí nú skal tað verða egg ella ungi.

# Møðist av ósemju um samanlegging

**RØKKUR ELLA STØKKUR** Annika Olsen sigur, at nú skal spurningurin um ein nýggjan kommunubygnað avgreiðast, antin so ella so

- Vit hava stríðst við at finna politiska semju um at nýskipa kommunubygnaðin í Føroyum í fleiri ár. Og eg má viðganga, at nú eri eg farin at møðast av hesum, so nú má tað røkka ella støkka.

Tað staðfestir Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Annars er tað ein spurningur, hvussu verið við ætlanin at nýskipa fólkaskúlan.

Fólkaflokkurin hevur kravt, at kommunurnar eisini fáa fólkaskúlan at umsita, men tað kravið er nú afturtikið.

### Stór avbjóðing

Tað er serliga Javnaðarflokkurin, sum hevur sýtt fyri at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar, tí stúrt verður fyri, at tað fer at føra til, at dygdin í skúlaskapinum verður ójøvn, alt eftir, hvussu kommunurnar eru fyri og, hvussu tær raðfesta skúlan.

Tað hevur Fólkaflokkurin nú boygt seg fyri. Men sum tað sæst í aðrari grein, krevur hann afturfyri, at ongin samanlegging verður, fyrrenn fólkaatkvøða hevur verið í kommununum um tað og meiriluti hevur verið fyri tí.

Tann stóra uppgávan hjá politiska bólkinum er nú at finna semju um, hvussu kommunurnar skulu fíggja tær eyka útreiðslurnar, tær fáa, tá ið tær fáa eldraøkið at umsita.

- Her eru ymsir møguleikar. Tosað hevur verið um eina kommunala útjavningarskipan, men tosað hevur eisini verið um at kommunurnar skulu fáa blokkstuðul til at fíggja eldraøkið og aðrar uppgávur við, sum verða lagdar frá landi til kommunurnar at umsita, sigur Annika Olsen.